


*Nr. 3* *4. februar 2018* *78. árg.*

# Hin firtni beiggin

*Tá varð hann illur og vildi ikki fara inn. Luk. 15,28.*

Orðið ***uttanfyri*** er tað, sum best lýsir eldra beiggjan. Inni var veitslan byrjað. „Teir tóku at halda sær á gaman," stendur í tekstinum. Ein ovurfegin pápi, sum fekk yngra sonin heilan heimaftur, og sonurin sjálvur, sum fekk eina so óvæntaða, hjartaliga móttøku, og so hini í húsinum, sum gleddust saman við teim glaðu. Øll vóru tey inni í veitslusalinum, **øll uttan eldri beiggin.** Hann var uttanfyri, ikki bara uttan fyri húsini, men eisini uttan fyri gleðina og uttan fyri ta góðsku, sum kann fyrigeva og gloyma tað, sum ikki hevur verið, sum tað skuldi.

Tað eru óivað mong, ið eru sum hann. Slík, sum fyrst og fremst eru nøgd við seg sjálvi, og teimum dámar ikki, at so nógv verður gjørt burtur úr hesum afturkomna, og tey eru heldur ikki serliga fyrigevandi ímóti honum.

Vit høvdu væntað, at eldri beiggin fór at frøast um, at hesin ævintýrarin, ið bæði var onkisverdur í hansara eygum, og sum hevði borið skomm yvir familjuna, nú fór at taka sær aðrar partar fyri og fór at byrja eitt nýtt og betri lív. Men nei! ***Hetta*** hevði merkiliga lítla ávirkan á eldra beiggjan. Hann tosaði framvegis bara um vánaliga lívið hjá beiggjanum, og tað fylti hansara harða og kalda hjarta við vanvirðing.

**Ja, hann var sanniliga uttanfyri.** Uttanfyri í kuldanum, har hjørtuni frysta, og har vildi hann eisini vera. Hann vildi ikki fara inn hagar, sum kærleikin og takksemið og gleðin fyltu øll rúmini. Hann var har úti, sum tú ikki sært tað góða hjá øðrum, bara tað ringa, og tí gerst hann meira og meira sjálvglaður og

harður og dømandi. Hugsa tær, at tað eru menniskju, sum enntá av fríum ***vilja velja at*** **vera uttanfyri! Neyðar fátæku sálir.**

Vit halda, at tað ikki eru mong, sum tað stendur so illa til hjá. Men kunnu vit øll siga okkum frí fyri viðhvørt at líkjast – ið hvussu so er eitt sindur – eldra beiggjanum? Hendir tað ikki viðhvørt, at okkara lyndi til at døma, ger tað trupult hjá okkum at gleðast av hjarta, tá ið slíkir syndarar venda um, ella í minsta lagi royna at gera tað?

Tað eru bara tey miskunnsomu og tey, sum aldri gloyma, at tey bara hava Guds stóru náði at takka fyri, at tey sjálvi eru tað, tey eru, sum av hjarta gleðast, tá ið stórir og smáir syndarar venda um.

Eydnurík eru tey, sum altíð eru innanfyri, har fløvin av takksemi og kærleika valdar, har ongin hevur køld hjørtu, sum fáa onnur hjørtu at frysta.

# Í Jesu navni

*Eg eri vegurin, sannleikin og lívið. Ongin kemur til faðirin uttan við mær. Jóh. 14,6.*

Tað man vera torført at gera av, um heimurin gongur fram ella aftur. Mong eru errin av teim miklu framstigum á okkara døgum. Onnur tosa mótfallin um mentanarligt forfall og mentanarligan undirgang.

Guds orð sigur greidliga, at hini óndu fara at ganga fram til tað, sum verri er, og hini góðu til tað, sum betri er. Tí eru Guds børn ikki í iva um, hvønn vegin tað ber. Vit ganga frameftir, altíð frameftir, tí at vit ganga í Jesu navni.

Jesus er vegurin og sannleikin og lívið, og hann er eisini vegleiðarin. Tí bara frameftir í Jesu navni, so gongur tað samstundis heimeftir, og tá verður hvør gleði og hvør saknur bara eitt fet á himmalvegi okkara.

Jú, av sonnum framgongd, tá ið alt, sum okkum er fyri av mótgangi ella trongd, gleði ella sakni, ávirkar okkum soleiðis, at vit ganga fram á Harrans vegi.

Í Jesu navni ganga vit trygg, har Jesu andi leiðir okkum. Hann linnar allan iva og ótta og ritar troyst og frið í hjarta

okkara. Soleiðis sigur Jesus Kristus: „Eg eri vegurin, sannleikin og lívið – av sonnum hin rætti vegurin til lívið í ljósi og myrkri.

***Jesus mín viti,***
***lýs tú mær døkkastu nátt,***
***og tá eg flyti***
***heim, inn um himmalsins gátt.***

*t.* týddi.

# Ikki bara lítlafingur

Ein søga er um ein pápa, sum hevði nógv um at vera, men sum kortini altíð gav sær stundir at vísa syni sínum umsorgan og ofta tók hann við á longum túrum út í skógin. Men tey stuttu beinini høvdu strævið við at orka at fylgja pápanum. Tí plagdi drongurin at taka um lítlafingur á honum. Men tá ið túrurin gjørdist langur, og hann kendi seg móðan, hugdi hann inn í pápans blíðu eygu og segði: „Nú mást tú taka hond mína, pápi, tí eg orki ikki at halda í teg longur."

Hetta er myndin, ið eg síggi fyri mær, tá ið Asaf í sálmi sínum yrkir um, hvussu gott tað er at rokna við Guds umsorgan. Í nánd av okkara æviga góða pápa í himlinum kunnu vit siga: *„Men eg eri jú altíð hjá tær, tú hevur tikið í mína høgru hond! Tú meg leiðir við tínum ráðum og tekur meg síðan til dýrdar!* (Sálmur 73,23–24).

# Tað, Gud hevur lovað

Ein kvinna skrivaði um tað at vera eitt Guds barn: „Gud hevur ikki lovað, at Himmalin altíð skal vera bláur, og at vegurin fram ígjøgnum lívið skal vera randaður av blomstrum. Gud hevur ikki lovað sól og turrveður, gleði uttan sorg, frið uttan pínu. Men Gud hevur lovað styrki til dagin, hvílu frá arbeiðinum, ljós á vegnum, náði undir royndum, hjálp úr tí høga, ósvikaliga vælvild og kærleika, sum ikki doyr."

Í Bíbliuni lesa vit um, at Gud hevur góð orð til teirra, sum líta á hann, tá ið tey koma í trupulleikar: *„Verið reystir og hugdjarvir og óttist ikki og verið ikki ræddir fyri teimum, tí at Harrin, Gud tín, vil sjálvur fara við tær; hann skal ikki sleppa tær og ikki geva teg yvir."* (5. Mós. 31,6).

# Frelsa frá syndum

*Og Jesus skalt tú kalla navn hansara, tí hann skal frelsa fólk sítt frá syndum teirra.     Matt. 1,21–22.*

Og Jesus skalt tú kalla navn hansara, tí at hann skal frelsa fólk sítt frá syndum teirra. Hesi vóru beinleiðis boðini til Jósef. Og hin rættvísi maðurin er altíð lýðin móti guddómligum boðum, og tí kallaði hann barnið Jesus.

Vit duga ikki neyvt at tíðarfesta hesa navnagávu; men vit kenna hitt vælsignaða navnið, navnið yvir øllum nøvnum. Bara í hesum navni er frelsa frá syndum.

Tey flestu á Kristi døgum vildu heldur hava eina aðra frelsu. Tey vildu fegin verða frelst frá tunga oki rómverja. Og nútíðar menniskju vilja fegin verða frelst frá trongd og mótgangi, fátækdómi, svongd og jarðiskari neyð.

Men hetta er ikki tann frelsan, sum býr undir Jesus–navninum. Jesus er ein frelsari og sáttarmaður fyri syndir okkara, ja, fyri øllum heiminum. Tað er hetta, sum Pætur ápostul leggur so stóran dent á fyri hinum jødiska ráðnum: ***„Og ikki er frelsa í nøkrum øðrum; tí at ikki er heldur nakað navn undir himlinum givið millum manna, sum vit skulu verða frelstir við.“*** (Áp. 4,12).

*t.* týddi.

---

Gud hevur investerað allan himmalin í tær, tá ið hann gav okkum Jesus. Tú ert ein gáva til mannaættina, tí at tú kemur við tí besta boðskapinum. Tað er avgjørt frammanundan, at vit vinna, tí Jesus vann á djevlinum á krossinum.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 4. febr. | Tekstur: Mark. 2,1–12. | bíbliuorð: Matt. 25,40b |
| 11. febr. | Tekstur: Matt. 4,1–11. | bíbliuorð: Matt. 4,10b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74




**Nr. 4** **18. februar 2018** **78. árg.**

# At læra uttanat

*Tí at hugsanir mínar eru ikki hugsanir tykkara, og vegir tykkara ikki vegir mínir, sigur Harrin, nei, sum himin er hægri enn jørðin, soleiðis eru vegir mínir hægri enn vegir tykkara og hugsanir mínar hægri enn hugsanir tykkara.*
*Jesaja 55,8–9.*

Mangan hevur verið funnist at uttanatlæru í skúlanum. Men tað, sum tú sum ungur lærir uttanat, kann sita í huganum heilt upp í ellisár. Í skúlanum hevur verið vanligt at læra uttanat bæði kvæði, fosturlandssangir, sálmar, trúarjáttanina og skriftstøð. Mangur, sum kom at sita blindur í mong ár, hevur havt gleði av tí, sum viðkomandi lærdi uttanat sum ungur. Ein prestur, sum helt eina andakt á einum ellisheimi, fortelur frá eini hending. Millum búfólkini var ein blind kona, sum eisini hoyrdi illa. Hon fekk helst lítið við av tí, sum prestur segði, tí tá ið hon helt hann vera lidnan, skar hon útúr at syngja:

***Skriv dig, Jesus, på mit hjerte,***
***du min konge og min Gud!***
***At ej vellyst eller smerte***
***dig formår at slette ud!***
***Denne indskrift på mig sæt:***
***Jesus min af Nazaret,***
***den korsfæstede, min ære***
***og min salighed skal være!***

At læra Guds orð uttanat er besti mátin at uppbyggja hug okkara. Tað er sum at hugsa tankar hansara eftir honum. Um

vit hugsa soleiðis, grettir tað ikki, at hugur okkara verður upplyftur av tí.

At læra brot úr Bíbliuni uttanat, gevur okkum innlit í og skil fyri Guds hugsanarhátti. Tað hjálpir okkum at virðismeta háttin, sum Gud hugsar! Og tað fer meira enn nakað annað at hækka og reinsa tankaverð okkara.

Eg átti ein skyldmann, sum misti sjónina í bestu árum; hann sat blindur í eini 40 ár. Tey seinastu árini var hann seingjarliggjandi. Tann dagin, hann doyði, tók hann um báðar songarstokkarnar og settist upp undir seg og sang hetta sálmaørindið hart og týðiliga:

***O, salig påskedag,***
***nu har vi vunden sag!***
***Langfredags bitre minde***
***må nu så sødt hensvinde;***
***thi Jesus vandt med ære,***
***hans navn velsignet være.***

So fall hann niður aftur í songina og var farin yvirum.

Um vit lata Bíbliunnar orð streyma ígjøgnum huga okkara, verða tær gomlu, óreinu hugsanirnar vaskaðar burtur. Og nýggjar hugsanir – Guds hugsanir – fara í staðin at taka búgv har.

# Hin lýsandi krossurin

Asbjørn Kvalbein helt á Visjon Norge eina andakt um krossin, har hann segði nakað so:

Ein maður, sum æt David, var fyristøðumaður í einum kristnum leguhúsi í Arkansas í USA. Oman fyri leguhúsið var ein heyggjur, og ovast á honum stóð ein lýsandi krossur. Hesin krossur var búmerki hjá leguhúsinum.

Eitt vetrarkvøld bankaði ein maður á dyrnar í leguhúsinum og bað David koyra seg niðan til krossin. David var einki serligt fyri hesum, tí vegurin var brattur og hálur, men hin bleiv við at streingja á og segði, at tað hevði so stóran týdning fyri seg at koma niðan til krossin.

David gav tí eftir, og meðan teir koyrdu niðan, segði maðurin søgu sína. Hann hevði upplivað ymiskt, sum gjørdi, at hann var

niðri í kolakjallaranum. Hann setti seg ein dagin í flogfar sítt og fleyg sær ein túr, og hann hugsaði nógv, um hann skuldi flúgva inn í ein fjallavegg og gera tað liðugt. Brádliga kom eitt tjúkt kavaæl og køvdi alt av. Hann gjørdist fjálturstungin og setti seg í samband við flogtornið í Little Rock. Teir spurdu hann, hvat ið hann sá niðri undir sær, tí so kundu teir siga honum, hvar ið hann var staddur. Men hann sá als einki, og tí var ógjørligt hjá teimum at rokna út, hvar hann var.

Brádliga sá hann ein lýsandi kross framman fyri sær. Tað fekk hann sagt teimum, og teir vistu beinanvegin, at hann var við leguhúsið og kundu geva honum positiónina. „Tað var hasin krossurin, sum bjargaði lívi mínum," segði maðurin, „tí er tað, at eg vil sleppa niðan til krossin, hann hevur so nógv at siga fyri meg, hann eigur lívið í mær!"

Mong eru tey menniskju, sum kunnu siga tað sama sum hesin maður. Á krossinum doyði Jesus Kristus fyri øll menniskju. Har rindaði hann fyri allar heimsins syndir, so at hann kundi rætta okkum eitt kvittað skuldabræv. (Kol. 2,11–15). Tað er ikki løgið, at krossurin hevur nógv at siga fyri okkum, og tað heilaga blóð, ið har fleyt. „Blóð Jesu, sonar hansara, reinsar okkum frá allari synd." (1. Jóh. 1,7). „Jesus gekk við egna blóði sínum eina ferð með alla inn í halgidómin og vann æviga loysn." (Hebr. 9,12). Men hetta er bert galdandi fyri tey, sum taka ímóti tí og takka honum fyri tað.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ljós heimsins

*„Eg eri ljós heimsins. Tann, sum fylgir mær, skal ikki ganga í myrkrinum, men hava lívsins ljós." Jóh. 8,12.*

Jesus var ógvuliga nágreiniligur í sínari orðing, so nágreiniligur, at áhoyrararnir máttu svara aftur. Hansara orð skiltu vøtnini. Mong menniskju vanvirdu orð hansara, meðan onnur lótu seg vegleiða. Tað sama hendir allastaðni, har evangeliið verður boðað. Antin verða fólk ovurfegin, ella eisini gerast tey ørg.

Men tá ið Jesus segði, at hann var ljós heimsins, gerast fólk bara ill og vanvirða hann. Orðini siga okkum, at hann er tað ljósið, sum ikki bleiktrar í vindinum, men fer at lýsa klárt út í allan ævinleikan.

Jesus er neyvan liðugur at siga hesi orðini, fyrr enn áhoyrararnir finnast harðliga at honum. Brádliga er hann í einari andaligari krígsstøðu, har ein skuldsetingin fyri og onnur eftir fúka um oyruni á honum, bara av tí at hann sigur, at hann er ljós heimsins. Men her eru vit við kjarnin í málinum. Menniskjuni tola ikki ljósið og vilja tí heldur ganga runt í myrkrinum.

Aftursvarið til orð hansara átti at verið stór frøi. Mong áttu at sagt: „Takk, Jesus, av tí at tú sigur okkum, at tú ert ljósið. Vit hava gjøgnum øll ættarliðini bíðað eftir einum ljósi. Jesaja hevur talað um teg. Endiliga stendur ljósið framman fyri eygum okkara."

Men nei, fólk skrála staðin fyri ímóti honum. Her verður tað profetiska orðið „teir mangir eru, ið fyri onga søk meg hata" (Sálm. 38,20) uppfylt. Jesus hevur bara lurtað eftir Faðir sínum, sum hevði sagt: Kom so við tí. Sig tað nú, at tú ert ljós heimsins – Jesus var lýðin og kom við teimum kollveltandi boðunum, sum hava broytt milliónir av menniskjum.

At enda er fólkahópurin so uppøstur, at hann er til reiðar at steina hann: „Tá tóku teir steinar upp til at kasta eftir honum. Men Jesus fjaldi seg og fór út úr halgidóminum."

Men sum tað var gott, at Jesus fekk sagt henda dýrabara setningin. Jóhannes evangelistur nevndi eisini evnið í byrjanini av sínum evangelii. Tað stendur um Jóhannes doyparan: „Hann var ikki ljósið, men hann skuldi vitna um ljósið. Hitt sanna ljósið, sum upplýsir hvørja menniskju, var við at koma í heimin." (Jóh. 1,8–9).

Jú, tað er Jesus sjálvur, sum skal upplýsa hvørja menniskju um tilverunnar meining.

Gert Grube.

*Effie Campbell* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 18. febr. | Tekstur: | 1. Mós. 30,22–24; 37,1–28. | bíbliuorð: | Róm. 2,11 |
| 25. febr. | Tekstur: | 1. Mós. 39,1–6+19–23;41,1a+14–43. | bíbliuorð: | Jes. 41,10c |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74